

# Norra vil hava útlendsk oljufeløg at leita eftir olju og gassi

Deil:



**Jan Müller**

28.09.2014 - 14:50

Oljan.fo

Hóast illa ber til at samanbera áhugan fyri oljuleting í Norra við hana í Føroyum, so ynskja bæði londini at fáa oljufeløgini at vísa sínum landgrunnum ans.

Sjálvur norski oljumálaráðharrin er nú farin út alment og heitir á altjóða oljufeløg at koma til Norra at leita eftir olju og gassi. Tord Lien vil hava meira virksemi á norska landgrunninum og bjóðar rætt og slætt europeiskum oljufeløgum á landgrunnin at bora.

“Vit vilja fegin síggja meira borivirksemi á norska landgrunninum. Vit hava sæð at virksemið er lækkað meira enn vit høvdu roknað við,” segði ráðharrin á eini felags orkuráðstevnu í Brussel seinasta hósdag. Tað veit NTB at siga frá.

“Tað eru nakrar fáar men stórar framleiðsluverkætlanir, sum komandi árini fara at økja um virksemi á norska landgrunninum, men eg vil fegin síggja fleiri brunnar boraðar. So europeisk oljufeløg eru vælkomin higar.

ES skal góðkenna eina nýggja orku- og veðurlagsætlan á sínum toppfundi í oktober.

Lien var á ráðstevnuni við tí endamáli at minna á, at norskt gass kann fáa ein týðandi leiklut í framtíðar orkusamansetingini.

“Heimurin hevur tørv á meiri og reinari orku. Gas ser loysnin í báðum førum,,” segði Lien. Norskt gass nøktaði 23% av brúkinum í ES í 2013.

Eisini føroyski starvsfelagin hjá Thord Lien, Johan Dahl, hevur alment sagt, at tørvur er á at fáa fleiri oljufeløg at hyggja hendavegin – tørvur er á fleiri brunnum, skal føroyska oljan finnast. Hann hevur m.a. sagt, at tað verður neyðugt hjá okkum at fara út í heim at luttaka á ráðstevnum og at banka á dyrnar hjá oljufeløgunum.

Støðan í føroysku leitingini er tann, at allir 9 brunnarnir, sum oljufeløg høvdu bundið seg til at bora, eru boraðir. Nú eftirmeta oljufeløg upplýsingar tey hava fingið frá teimum síðstu brunnunum og hava onkur teirra sagt seg vilja taka støðu til framtíðina í Føroyum í næstu framtíð.

Feløgini, sum framvegis eru virkin í Føroyum, eru Statoil, DONG, ExxonMobil, OMV og Atlantic Petroleum.